





# verið virkin”

víst í fimleiki í skúlanum, og nú hann er komin nakað upp í árini, og hvørki spælir hondbólt ella ger fimleik, so gongur hann næstan dagliga ein túr saman við konuni.

Itrottini hevur hann tó ikki slept heilt, og fylgir hann væl við hvat hendir. Eisini HM-kappingin í fótbólti, sum var í Týsklandi fylgdi hann í sjónvarpinum. - Tað var deiliga fittligt at hava ein dyst at hyggja eftir, sigur Sigurð Petersen.

### Kennir øll

Tá Sigurð bygdi húsini stóðu tey fyri seg sjálvi, eitt fitt petti frá bygdini. Nú eru hús komin bæði omanfyri og niðanfyri hjá øllum, og tað er nakað Sigurð gleðist um. Hóast tað eru fleiri avbygdafólk, sum byggja í Sandavági, so er tað oftast soleiðis, at annar makin er úr bygdini. Og tá Sigurð hevur verið lærari og stjóri í so nógv ár, so kennir hann meginpartin av bygdini. - Ja, tað er so stutt síðani at eg gavst, so eg havi havt ein stóran part av teimum, sum í dag búgva og byggja her, sum næmingar, staðfestir Sigurð við einum smíli.

Kaffi er nú drukkið, og vit gera okkum til at reisa okkum. Men áðrenn vit fara biðja vit hann vísa okkum mylnuna, hann hevur í ánni í havanum. Á veg út spyrji eg til stuttleika, um hann eisini skjýtur harur. – Nei, tað havi eg ongantíð gjørt. Sum unglingi var eg viðhvørt við og bar, men eg havi ongantíð skotið sjálvur, sigur hann, og so leggur hann aftrat: Men mær dámar væl at fiska síl, og eg kundi hugsað mær at farið ein túr á Fjallavatn, fyrsta dagin tað viðrar.

Sigurð Petersen vísir okkum mylnuna, og letur vatnið renna ígjøgnum, soleiðis at vit veruliga síggja, at hon riggar. Hann fylgir okkum síðani niðan til portrið, og vit biðja hesi orkukelduni av einum manni farvæl.

> ” *– Eg orki líka væl vanliga gongd sum allir hinir, men tað er um okkurt knappliga hendur, at eg kanska eri í seinra lagi*

**Sigurð Petersen**
er føddur og uppvaksin á Steigini í Sandavági, og tað var har, hann trakkaði sínar barnaskógvar.

Sum hálvungur fór Sigurð Petersen undir bónda- og fiskaarbeiði. Tá kríggið byrjaði og onglendingarnir komu henda vegin, arbeiddi hann hjá teimum í eina tíð. Síðani gekk leiðin til Íslands, har hann arbeiddi á einum bóndagarði. Og í Íslandi hevur hann vitjað aftur síðani.

Aftur komin til Føroya fór Sigurð á Læraraskúla í Havn. Tá hann var liðgur arbeiddi hann eitt ár sum lærari í Havnini, áðrenn hann fór niður at lesa eitt ár aftrat.

Heim aftur komin fór hann í starv sum lærari í Sandavági, har hann stutt eftir varð stjóri. Tað starvið hevði hann, til hann fór frá fyri aldur í 1992.